## Oljuvinnufelagið hevur havt aðalfund



Mikudagin 23. apríl hevði Oljuvinnufelagið aðalfund. Á aðalfundinum stóðu Magni Arge og Líggjas Joensen fyri vali. Magni Arge stillaði uppaftur og varð aftur valdur. Líggjas Joensen stillaði ikki uppaftur. Í hansara stað varð valdur Jostein Petersen. Í nevndini í Oljuvinnufelagnum sita nú Magni Arge, Gunnbjørn Joensen, Jákup Mikkelsen, Anja Jacobsen og Jostein Petersen. Nevndin hevur skipað seg við Magna Arge sum formanni og Gunnbjørn Joensen sum næstformanni.

## Stórir møguleikar fyri vøkstri í telduspælídnaðinum

Telduspælídnaðurin í Danmark merkir stóra framgongd, og næstu árini verður roknað við enn størri vøkstri. Treytin er tó, at vinnugreinin og vinnan sum heild skilur og gagnnýtir teir stóru møguleikarnar í hesi vinnu. ITEK, sum er danska vinnufelagið fyri KT-fyritøkur skipaðu herfyri fyri ráðstevnu um menning av telduspølum og møguleikum fyri vøkstri í hesi vinnuni. Á ráðstevnuni kom fram, at tað eru alt fleiri virkir, sum hava funnið út av, at telduspøl ikki bara skulu vera stuttlig, men eisini avbjóðandi í aðrar mátar. Men spælídnaðurin hevur brúk fyri meiri peningi, um vinnugreinin skal menna seg enn meira. Meiri peningur eigur at verða játtaður til stuðul av verkætlanum og klekingarumstøðum til fyritøkur, verður sagt frá ITEK. (www.industry.fo)

# Vóni vit raka við olju

**-Tað hevur stóran týdning at skapa góðar karmar fyri oljuleitingarvirksemi á føroyska landgrunninum, soleiðis at vit vónandi raka við olju í undirgrundini sigur nýggju oljumálaráðharrin Tórbjørn Jacobsen**

OLJUVINNA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað eru umleið tveir mánaðir síðani, at nýtt landsstýri tók við. Í tí sambandi hendu eisini broytingar á oljuøkinum. Higartil hevur kolvetnisvinnan og tað vil fyrst og fremst siga leiting eftir kolvetni verið partur av virkisøkinum hjá Vinnumálaráðnum. Nú er hetta málsøkið flutt til eitt nýtt landsstýrismálaráð, nevniliga nýggja Tilfeingisráðið, sum aftur er partur av Fiskimálaráðanum. Landsstýrismaðurin, sum í dag umsitur kolvetnisleiting, er Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldi. Seinastu árini hevur Bjarni Djurholm sum vinnumálaráðharri umsitið oljumálini. Fara vit longur aftur var tað løgmaður, sum umsat hetta økið.

Nú um dagarnar var nýggi oljumálaráðharrin gestur í Rás2, har hann fyri fyrstu ferð úttalaði seg alment um kolvetnisøkið.

Rás2 spurdi landsstýrismannin, um tað ikki var ein sera vánalig timing at fara í løgtingið við nýggjari útbjóðingarrundu um somu tíð sum kunngjørt varð, at Williambrunnurin var eitt vónbrot!

Tórbjørn Jacobsen: - Tann sætta boringin er ikki størri vónbrot enn so, at man hevur ikki borað so langt niður, at man kann staðfesta, at einki úrslit spyrst burtur úr longur niðri, enn man er komin við boringini. Eg tók júst henda spurningin upp við Jarðfeingi og spurdi, um tað ikki var psykologskt illa timað tíðspunkt at bera uppskotið um 3. útbjóðing aftur í tingið. Tað var entá viðgjørt sama dag sum turri Williambrunnurin varð kunngjørdur. Men Jarðfeingi metti, at tað var ikki skeiv tíð at gera hetta, tí politikkurin hevur verið, at man eigur at hava eitt áhaldandi flóð í arbeiðinum, soleiðis at man ikki fær nakra uppiløgu í virksemið á Føroyaleiðini.

Eftir at hava spurt Jarðfeingi, hvussu áhugin er nú, er tað nakað tíðliga at fáa nakað boð, tí uppskotið er júst lagt fyri tingið. Men Jarðfeingi upplýsir, at tað er ein ávísur áhugi, serliga eftir at man hevur latið tey data út, sum lógin heimiðlar, at man kann geva teimum áhugaðu.

### Gamal tanki

- Hvussu ber tað til, at oljumál vórðu løgd undir Fiskimálaráðið, nú man veit, hvussu nógvar uppgávur liggja har.

- Tað er í hvussu er ein gamal tanki hjá mær, at man eigur at leggja allar tilfeingisvinnurnar saman í eitt ráð og so at býta tey ymsu økini sundur í tekniskar fyrisitingar (direktorat), sum sita við sjálvum teknikkinum, meðan tilfeingismálaráðharrin og hansara ráð tóku sær av tí politiska virkseminum.

Taka vit oljumál, so fer alt tað tekniska virksemið fram í sjálvum direktoratinum, meðan avgerðir, ið skulu takast sum t.d. við Williambrunninum kunnu blíva politiskir spurningar, sum landsstýrismaðurin skal taka avgerð um. Tí verður sjálv arbeiðsbyrðan ikki so stór, at hon ikki verður yvirkomilig. Tórbjørn Jacobsen sær tí einki skeivt í tí at flyta oljumálini úr Vinnumálaráðnum til Tilfeingismálaráðið. Tvørturímóti heldur hann tað vera skilagott og rætt.

### Væl lagt til rættis

- Síðani tú tókst við sum ráðharri fyri kolvetnismálinum hava vit lítið og einki hoyrt um tínar visiónir og tankar á hesum økinum.

- Eg haldi, at kolvetnisvinnan er ótrúliga væl tilrættaløgd frá byrjan av. Tað er gleðiligt at síggja, at okkara fólk hava megnað at gera eina føroyska lóggávu og fyrisiting, sum virkar nógv betri enn lóggávan og praksis á nógvum øðrum tilfeingisøkjum.

Eg haldi visiónirnar vórðu longu lagdar, tá alt tað fór í gongd í sínari tíð. Tað er eingin orsøk til at gera tær stóru broytingarnar í lóggávuni, sum liggur til grund undir oljuvinnuni í Føroyum, tí hon er so mikið væl frágingin, at hetta er ikki neyðugt.

### Kanna avleiðingar

- Tit skriva í samgonguskjalinum, at tit ætla at seta í verk kanning av bæði avleiðingum og møguleikum av eini komandi kolvetnisvinnu. Hvat ætla tit har.

- Tá spurt verður um visiónir, so er oljuvinnan ein nokkso materiell vinna soleiðis at skilja, at antin finnur tú olju ella ger tú tað ikki. Finnur tú olju, og eitt stórt virksemi í landinum stendst av tí, so má tann politiska skipanin gera sær greitt, at tað fer at hava eina stóra ávirkan á tað føroyska samfelagið. Nógv fólk vilja koma til landið, og tað verður nógv onnur framleiðsla enn tað, sum er frammanundan. Tvs. at høvuðsvinn-




*"Kolvetnisvinnan er ótrúliga væl tilrættaløgd frá byrjan av. Tað er gleðiligt at síggja, at okkara fólk hava megnað at gera eina føroyska lóggávu og fyrisiting, sum virkar nógv betri enn lóggávan og praksis á nógvum øðrum tilfeingisøkjum."*

*"Tað er eingin orsøk til at gera tær stóru broytingarnar í lóggávuni, sum liggur til grund undir oljuvinnuni í Føroyum. Hon er so mikið væl frágingin, at hetta er ikki neyðugt."*

*"Vit eiga avgjørt, eisini um vit finna olju, at gera eina veruliga mentanardubbing í Føroyum."*